# trekk




*Donsk/norska Benja Stig Fagerland talaði um drúgvu og væleydnaðu royndir sínar við at fáa kvinnur við í nevndir og leiðslur í Norra. Hon stóð á odda fyri stórari verkætlan á privata norska arbeiðsmarknaðinum frá 2002-2005, har norska arbeiðsgevarafelagið, NHO, gav henni møguleika at fremja verkætlanina Female Future í verki. Tá reyk kvinnuliga umboðanin í nevndunum úr seks prosentum upp um tey 20.*
*Europeiski vinnufelagsskapurin UNICE útnevndi Female Future at vera besta europeiska javnstøðuverkætlan, og ST gav Female Future heitið Best Practice. Stórtingið lat Fagerland Pippi-prísin fyri at hava brotið mannligu eindarmentanina á vinnulívstindunum.*



*Jóna Olsen við 15 ára gomlu dóttrini Katrin Johannessen. Katrin hevði tikið frí frá arbeiði á Kósini, so hon slapp á kvinnutiltak í dag. Helst yngsti luttakari av teimum 650.*



*Tær fýra Gunnvá Zakariassen, Sólvá Vang, Annika Joensen og Elsa Torkilshøj søgdu, at hetta er ein kick-start til eina broyting á javnstøðuøkinum í Føroyum.*
*- Her verður skrivað søga í dag, søgdu tær.*



*Karin Margreta Larsen, Dagunn Clementsen, Eydna í Homrum, Guðrun B. Beck og Karin Andreassen hugna sær í steðginum. Tær vóna, at fleiri fólk fara at rópa seg feministar framyvir, og at fleiri kvinnur verða valdar inn næsta val.*





